# Í GÓÐUM HONDUM

## Starvsfólkatørvur á vælferðarøkinum – avbjóðingar og uppskot til loysnir

Frágreiðing, mars 2022

# INNIHALD

**Inngangur** ..... **3**
Endamálið við arbeiðinum ..... 3
Skipan av arbeiðinum ..... 3
Samandráttur ..... 4

**Bráðneyðugur starvsfólkatørvur** ..... **6**
Framskrivingar ..... 6
Fortreytirnar kunnu broytast ..... 7
Niðursett tíð ..... 7
Tørvur hjá Almannaverkinum næstu 10 árini ..... 7

**Bakstøði** ..... **8**
Føroyska vælferðarskipanin í norðurlendskum høpi ..... 8
Bygnaður og samanbering – serøkið – stovnsstøddir ..... 9
Bygnaður og samanbering – eldraøkið – tal av røktarplássum, stovnsstøddir og normering ..... 9
Røktarheimspláss – lutfall ..... 9
Røktarheimspláss – stovnsstøddir ..... 10
Normeringar og rakstur – eldraøkið ..... 10
Dagstovnaøkið og heilsuøkið ..... 10
Bústovnar í Føroyum ..... 11

**Fleiri starvsfólk** ..... **12**
Útbúgving og menning av førleikum ..... 12
Nýggj deild á Heilsuskúla Føroya ..... 12
Økja áhugan ..... 12
Fleiri námsfrøðingar ..... 12
Fjarundirvísing ..... 13
Førleikameting og vaksnamannaútbúgvingar ..... 13
Ískoytispakkar til víðariútbúgving ..... 13
Stuðulsskipanir ..... 14
Arbeiða fulla tíð ..... 15
Lønarviðurskifti ..... 15

**Skynsamari arbeiðsumstøður** ..... **16**
Almannaverkið ..... 16
Eldraøkið ..... 18
Geirasamstarv ..... 19
Organisering ..... 19
Aðrir fakbólkar ..... 19

**Tíðarhóskandi bústaðir** ..... **20**
Bústaðartørvur – eldraøkið – eldrabústaðir ..... 20
Nógvir fyrimunir eru við eldrabústøðum ..... 20
Samstarv millum kommunur og Bústaðir ..... 20
Bústaðartørvur – almannaøkið ..... 21
Vælferðartøkni ..... 21

**Heilsufremjan og rættstundis átøk** ..... **22**
Kropslig heilsa ..... 22
Sálarlig heilsa ..... 23
Fyribyrging – betri dagstovnar ..... 23
Fyribyrging – bú/viðgerðarstovnar til sálarsjúk ung ..... 24
Fyribyrging – heimavitjanir ..... 25
Rehabilitering – systematisk, útgreinandi og tvørgangandi rehabilitering ..... 25

**Aðrir aktørar í vælferðini** ..... **26**
Sjálvboðin arbeiðsmegi ..... 26
Avvarðandi ..... 27
Avmynstring ..... 27
Privatir aktørar ..... 27

**Yvirlit yvir loysnir** ..... **28**

**Niðurstøða** ..... **29**

**Luttakaralisti** ..... **30**

Ein temafrágreiðing frá Búskaparráðnum á vári 2021 vísti, at tað fer at verða álvarsligur tørvur á starvsfólkum á vælferðarøkinum komandi árini, um núverandi støði, bygnaður, arbeiðshættir osfr. bert verða framskrivað. Avbjóðingin kemur serliga av demografisku framskrivingini, sum vísir, at aldursbólkurin omanfyri 80 ár fer at vaksa við uml. 1.200 fólkum ella 52% komandi 10 árini.

Landsstýrið hevur tí sett eitt tvørgeiraligt arbeiði á embætismannastigi í gongd at lýsa trupulleikan nærri og koma við boðum uppá, hvat kann gerast fyri at tálma starvsfólkatørvinum og fyri at tryggja, at vælferðartænasturnar eisini í árunum, sum koma, kunnu loysast á ein fakliga fullgóðan hátt.

**UM 10 ÁR VERÐA VIT 52% FLEIRI FÓLK YVIR 80 ÁR**

## ENDAMÁL

Endamálið við arbeiðinum er at bera fram samskipað boð uppá, hvussu avbjóðingin við stóra starvsfólkatørvinum innan røkt og námsfrøði kann loysast komandi 10 árini á eldra-, heilsu-, almanna- og dagstovnaøkjunum.

Starvsfólkatrotið verður lýst, og víst verður á møguligar loysnir, sum kunnu fata um útbúgving, at arbeiða øðrvísi, at umskipa tilgongdir, at meta um fíggjarligan kostnað og at stimbra insitament og tileggja at starvast og mennast innan økini. Tey vælferðarøkini, ið verða viðgjørd í frágreiðingini, eru almannaøkið, eldraøkið, dagstovnaøkið og í minni mun sjúkrahúsverkið. Teir fakbólkarnir, ið verða viðgjørdir, eru fakbólkar, ið kunnu nema útbúgving í Føroyum.

### Skipan av arbeiðinum

Arbeiðið fór í gongd í oktober 2021 og hevur verið skipað við einum stýrisbólki, fýra arbeiðsbólkum og einum samskipanarbólki. Arbeiðið hevur verið tvørgeiraligt heilt frá stýrisbólkinum og út í arbeiðsbólkarnar við luttøku frá:

- Kommunufelagnum
- Almannamálaráðnum
- Almannaverkinum
- Heilsumálaráðnum
- Sjúkrahúsverkinum
- Uttanríkis- og mentamálaráðnum
- Fíggjarmálaráðnum

Tilsamans hava uml. 30 fólk frá hesum ráðum og stovnum undir teimum verið við í hesum tvørgeiraliga og tvørfakliga arbeiði.

Arbeiðið hevur verið miðsavnað um tvær verkstovur í november 2021 og januar 2022, har luttakararnir hava lýst avbjóðingarnar og møguligar loysnir. Arbeiðsbólkarnir hava síðan saman við samskiparunum skrivað og greinað uppskotini, sum nú eru savnað í eitt yvirskipað strategiskjal, sum verður lagt fram. Sostatt liggur meira tilfar aftanfyri øll uppskotini.

Uppskotini verða nú latin politisku skipanini til íblásturs og til at viðgera. Ymsir áhugabólkar eiga eisini at verða hoyrdir og tiknir upp á ráð, soleiðis at eitt samlað og eftirfarandi grundarlag er fyri einum víðari orðaskifti um, hvat skal gerast í hesum átrokandi máli.

## Samandráttur

Frágreiðingin er skipað í innleiðandi partar, ið lýsa trupulleikan viðvíkjandi starvsfólkatørvi nú og frameftir – eins og føroyska vælferðaskipanin verður lýst. Tað er heilt greitt, at verður onki gjørt ella broytt, fer tørvur at verða á heilt nógvum starvsfólkum innanfyri vælferðarøkini komandi árini – serliga innan serøkið, eldraøkið og dagstovnaøkið. Tað framgongur eisini, at bústovnar í føroysku vælferðarskipanini eru rættiliga smáir samanborið við londini rundanum okkum. Og í summum førum síggjast eisini høgar normeringar samanborið við grannalondini. Síðani koma partar, ið vísa á, hvat vit eiga at kanna, og hvat kann gerast fyri at tálma vøkstrinum í starvsfólkatørvinum.

Ein týðandi partur er at økja um starvsfólkaútboðið við at útbúgva fleiri, eggja fleiri til at arbeiða innan økið, endurskoða stuðulsskipanir osfr.

Men eisini er neyðugt at kanna, hvussu vælferðartænasturnar eru skipaðar, og hvussu raksturin kann gerast skynsamari. Hesir partar snúgva seg um, hvussu starvsfólkatørvurin kann minkast við t.d. at broyta stovnsbygnað, fara undir at gera nýggjar bústaðarmøguleikar, broyta arbeiðsgongdir, gagnnýta fakligu førleikarnar skilabetri, brúka tøkni, gera førleikarnar hjá borgarunum betri, skipa samstarvið við sjálvboðin og aðrar bólkar betri osfr.

Frágreiðingin vísir á fleiri møguleikar, ið kunnu og eiga at troytast, fyri at tálma starvsfólkatørvinum innan vælferðarøkið.  Ávísir møguleikar kunnu kannast og setast í verk skjótt, aðrir hava longri perspektiv. Men allir hava týdning fyri starvsfólkatørvin og tískil fyri, hvussu vælferðaruppgávurnar kunnu loysast nú og í framtíðini í Føroyum.

Í hesi frágreiðingini framgongur, hvussu teir ymisku møguleikarnir allir – hvør í sínum lagi – eru við til at loysa starvsfólkatørvin, soleiðis at vit í 2030 eru líka væl fyri at lyfta vælferðaruppgávuna sum í dag, hósat talið av borgarum við tørvi á vælferðartænastum er munandi vaksið.

**VIT MUGU M.A. KANNA, HVUSSU RAKSTURIN AV VÆLFERÐARTÆNASTUM KANN GERAST SKYNSAMARI**

Framrokningarnar vísa, at tørvur verður á stívliga 2.500 fleiri starvsfólkum at arbeiða innan kjarnu vælferðartænastur innan serliga eldra- og almannaøkið næstu átta árini.

Ovasta myndin: ”Átøk, útbúgving o.a.”er ein roynd at greina, hvussu vit røkka starvsfólkatørvinum. Eldrabústaðir (reyðu stabbarnir) minka um tørvin á røktarheimsplássum og krevja færri starvsfólk.

Onnur átøk (gulu stabbarnir) verða viðgjørd í frágreiðingini og fevna um millum annað vælferðartøkni, fyribyrging og geirasamstarv. Hesi átøk verða mett at muna umleið 15%, men kunnu møguliga muna meira, um allir møguleikar verða troyttir væl við skilagóðum og fakliga sterkum loysnum. Endamálið er at minka um starvsfólkatørvin, og at varðveita økið í góðum hondum.

Myndin í miðjuni: ”Starvsfólk íalt” vísir vaksandi tørvin á starvsfólki næstu árini, og hvussu lutfallið er millum fólk, sum fara frá við pensjón (bláu stabbarnir) og hvussu nógv nýggj størv (gulu stabbarnir) verða neyðug, orsakað av økta tørvinum.

Myndin niðast: ”Útbúgvingartørvur” vísir, at skal útbúgvingartørvurin røkkast, so krevur tað munandi økta upptøku. Hesin spurningur verður viðgjørdur seinni í frágreiðingini. Ivasamt er tó, um tað er sannlíkt at vænta so stóra tilgongd til útbúgvingarnar til starvsfólk, ella um onnur átøk mugu setast í verk, møguliga økt tilflyting.

Ítøkilig átøk kunnu minka um starvsfólkatørvin við **35%** á ávísum økjum

Í hesum útrokningum eru effektiviseringar hjá Almannaverkinum ikki íroknaðar. Mett verður, at Almannaverkið kann veita somu tænastu í størri og fakliga sterkum eindum og brúka 20 – 40 % færri starvsfólk. Tað er eyðsæð, at slíkar loysnir eru neyðugar. Eisini kann tað fáa ávirkan, um fleiri fólk fara at arbeiða fulla tíð. Hetta verður viðgjørt nærri seinni í frágreiðingini.

**Átøk, útbúgving o.a.**




**Starvsfólk íalt**




**Útbúgvingartørvur**



Tað er ógvuliga trupult at finna rætta myndamálið at lýsa stóra samfelagsliga trupulleikan við vantandi arbeiðsmegi innan vælferðarøkið í dag og næstu árini. Brennandi platformur fær ivaleyst tey flestu at hugsa um eina leiðslubók, men symbolið um ein bráðneyðugan tørv tykist at hóska væl. Tað er einki at ivast í, at trupulleikin er bæði stórur og sjónligur.

Eingin einføld loysn finst á trupulleikanum, men tað er eisini greitt, at her er einki í at velja. Loysnir skulu finnast, og kamelar skulu slúkast. Tað er stutt og greitt grundarlagið undir vælferðarsamfelagnum, ið vit her viðgera.

Almannaverkið:

## TØRVUR ER Á 500 STARVSFÓLKUM AFTURAT KOMANDI 10 ÁRINI

### FRAMSKRIVINGAR

Búskaparráðið viðgjørdi í serfrágreiðing á vári 2021 støðuna viðvíkjandi starvsfólkatørvi á vælferðarøkinum. Grundarlagið er framskrivingar av fólkatalinum frá Hagstovu Føroya.

Fortreytirnar handan útrokningarnar eru, at fólk í dag liva nógv longri enn áður. Føroyskar kvinnur eiga nógv børn í mun til kvinnur í øðrum londum. Fólkafráflyting er søguliga ein stórur trupulleiki í Føroyum. Tað er óvissa um talið av børnum, sum verða fødd um árið komandi árini, hetta kann og verður ávirkað av búskaparstøðuni, til- og fráflyting og øðrum viðurskiftum. Men vit kenna okkum rættiliga vís í, at talið av borgarum í pensjónsaldri verður rættiliga nær tí metta talinum. Framrokningarnar byggja á, at fólk fara at hava sama tørv á viðgerð komandi árini sum nú.

Aldursbólkurin yvir 80 ár fer at vaksa við umleið 1.200 fólkum ella 52% komandi 10 árini. Tørvurin í eldrarøktini verður umleið 700 starvsfólk afturat verandi starvsfólkahópi, umframt 338 nýggj bupláss næstu 10 árini, um verandi vælferðarstøði frá 2020 skal haldast í 2030. Harumframt fara 358 fulltíðarstarvsfólk frá við pensjón komandi 10 árini á eldraøkinum.

Í sjúkrahúsverkinum starvast 394 sjúkrarøktarfrøðingar (fulltíðarstarvsfólk). Framrokningar eru gjørdar í norðurlendskum hopi, ið vísa, at tørvur verður á 30% fleiri ársverkum vegna demografisku gongdina.

**Sambært útrokning hjá Almannaverkinum er tørvur á 500 starvsfólkum afturat verandi starvsfólkahópi komandi 10 árini vegna demografiskar broytingar og nýtt virksemi. Harafturat væntast 200 – 300 starvsfólk at fara frá fyri aldur komandi 10 árini.**

**Fólkatal 1985-2030 (framskrivað)**




**Fólkatal 1985-2030 (framskrivað)**




## FORTREYTIRNAR KUNNU BROYTAST

Nógv óvæntað kann sjálvsagt henda eftir 10 árum. Eitt skifti í konjunkturunum kann til dømis broyta nógv. Fólkið kann eisini gerast munandi betri fyri likamliga, og hetta kann ávirka tørvin á viðgerð og hjálp munandi – og harvið eisini kostnaðin.

## NIÐURSETT TÍÐ

Ein stór avbjóðing á øllum vælferðarøkinum er, at ein stórur partur av starvsfólkunum arbeiða niðursetta tíð. Eitt nú eru at kalla bert leiðarar innan dagstovnaøkið settir í fult starv.

Tá hugt verður at, hvussu nógv kjarnustarvsfólkini innan eldraøkið arbeiða, sæst, at tey arbeiða rættiliga nógv, serliga um havt verður í huga, at talan í stóran mun er um kvinnur um 60-ára aldur. Helvtin arbeiðir meira enn 0,9 ársverk um árið, og ¼ av teimum arbeiðir meira enn fulla tíð. Hinvegin er eitt sera stórt tal av fólki, sum arbeiðir í styttri tíðarskeið, ella bara arbeiðir parttíð.

## TØRVUR HJÁ ALMANNAVERKINUM NÆSTU 10 ÁRINI

Almannaverkið kann staðfesta, at tørvur er á alsamt fleiri tænastum innan almannaøkið.

244 borgarar búgva á bústovnum hjá Almannaverkinum. Í løtuni, januar 2022, standa 192 borgarar á bíðilista til sambýli, búfelagsskap ella bú- og viðgerðarstovn, fleiri hava staðið á bíðilista í fleiri ár. Av hesum hava 170 einki bústaðartilboð frá Almannaverkinum, tað er ein øking á 13% frá ársbyrjan 2021, tá var bíðilistin til bústað innan Almannaverkið 150.

Afturat hesum eru 89 borgarar, sum fáa aðrar tænastur frá Almannaverkinum, og sum fara at hava tørv á einum bústaði frá Almannaverkinum komandi 10 árini. Av hesum hava 80% (71 borgarar) tørv á bústaði innan 5 ár.

Tað vil siga, at tørvurin komandi 10 árini er upp ímóti 500 bústøðum íroknað núverandi búpláss. Í tíðarskeiðinum fella nakrir borgarar frá, men royndirnar vísa, at nettovøksturin ger, at Almannaverkið fær tørv á umleið 500 bústøðum komandi 10 árini, og teir allarflestu longu innan 5 ár.

Í Føroyum eins og í øðrum Norðurlondum hava borgararnir lógartryggjaðan rætt til tænastur frá tí almenna. Tey stóru vælferðarøkini eru:

- **ELDRAØKIÐ** – í høvuðsheitum heimatænasta og røktarheim
- **DAGSTOVNAØKIÐ** – menning av børnum upp til skúlaaldur
- **ÚTBÚGVINGARØKIÐ** – útbúgving og undirvísing
- **HEILSUVERKIÐ** – sjúkraviðgerð og sjúkrafyribyrging
- **SERØKIÐ** – stuðuls-, bústaðar-, umlættingar- og virknistilboð til borgarar við skerdum sálarligum ella likamligum førleikum

Menningin av vælferðarsamfeløgunum í Norðurlondum er farin fram upp ígjøgnum 1900-talið, og soleiðis er eisini í Føroyum. Fatanin, at samfelagið hevur eina felags skattafíggjaða ábyrgd av borgarum, sum hava tørv á tí, er kjarnin í vælferðarsamfelagnum, sum stórt sæð allir borgarar og øll tann politiska skipanin í dag eru á einum máli um.

Almannaverkið (landið) varðar av tænastunum innan serøkið, Heilsuverkið (landið) varðar av heilsutænastum, herundir sjúkrahúsunum, sum Sjúkrahúsverkið tekur sær av. Kommunurnar varða av eldraøkinum og dagstovnaøkinum.

Ábyrgdarbýtið millum omanfyri nevndu geirar er ikki altíð heilt týðiligt. Borgaratørvur, skipanir og øki umskarast ofta, og hetta setur krøv til samstarv og samskipan.



## FØROYSKA VÆLFERÐARSKIPANIN Í NORÐURLENDSKUM HØPI

Skipanirnar í Norðurlondum eru rættiliga líkar. Tilboðini um røktarpláss, búpláss, stuðul og heimatænastu síggjast aftur í okkara grannalondum. Tó er eisini avgerandi munur á, hvussu tænasturnar eru skipaðar. Serliga tá tað snýr seg um støddir á eindum og um normeringar. Kanningar vísa, at føroyska skipanin samlað sæð er tann dýrasta (máld í parti av BTÚ) í øllum Norðurlondum.

Í Føroyum er bygnaðurin eyðkendur av lutfalsliga smáum eindum, tá talan er um bústovnar á serøkinum og eldraøkinum.

# 43 STOVNAR VIÐ TILSAMANS 234 BÚPLÁSSUM

**BERT 5,4 BÚPLÁSS**
pr. stovn í miðal

### Bygnaður og samanbering: serøkið – stovnsstøddir

Í hesari frágreiðingini verða 43 bústovnar hjá Almannaverkinum viðgjørdir (herav 3 sjálvsognarstovnar) fyri vaksin við tilsamans 234 plássum. Av hesum hava 37 stovnar færri enn 11 pláss og 9 stovnar hava bert eitt pláss, sonevndar einstaklingafyriskipanir. Miðaltalið av plássum á hesum 43 stovnunum er 5,4. Til samanberingar kann nevnast, at miðaltalið av plássum á bústovnum á serøkinum í Vejle Kommunu er uml. 73 og í Bodø Kommunu uml. 16.

Samanumtikið kann sigast at stovnarnir á serøkinum eru sera smáir samanborið við londini rundanum okkum.

### Bygnaður og samanbering: eldraøkið – tal av røktarplássum, stovnsstøddir og normering

Kommunurnar yvirtóku ábyrgdina av eldraøkinum 1. januar 2015.

Kommunurnar hava síðani skipað eldraøkið í ein bygnað við 8 fyrisitingarligum eindum (7 kommunal samstørv + Tórshavnar Kommunu).

Tær kommunalu tænasturnar á eldraøkinum kunnu skipast í tveir høvuðsbólkar, sum eru sínámillum samanhangandi: heimatænasta, sum er heimarøkt og sjúkrarøkt, og røktarheim.

Uml. 850 borgarar fáa heimatænastu. Talið er vaksandi.

### Røktarheimspláss – lutfall

Talið av eldrabúplássum er lutfalsliga stórt í Føroyum í mun til aðrastaðni. Lutfallið millum eldrabúpláss og talið av borgarum 80+ er 0,27. Til samanberingar kann nevnast, at samsvarandi tal í Danmark er 0,14. Tað merkir, at vit hava umleið tvær ferðir so nógv eldrabúpláss í Føroyum samanborið við Danmark í mun til talið av borgarum omanfyri 80 ár.

Munurin kemst serliga av teimum nógvu almennu eldrabústøðunum í Danmark. Verða almennu eldrabústaðirnir roknaðir uppí, so gerst danska lutfallið 0,22, har tað føroyska er 0,27. So hóast munurin minkar, er føroyska talið framvegis fjórðingin størri.

Í Álandi, sum helst er tað landið, sum vit landafrøðiliga best kunnu samanbera okkum við, síggja vit somu mynd. Har er lutfallið uml. 0,23, og talið av røktarheimsplássum er lutfalsliga minkandi eins og í Danmark.

Samanumtikið kann sigast, at útbyggingin av eldraøkinum í okkara grannalondum flytur seg frá siðbundnu røktarheimunum til ymisk sløg av eldraíbúðum, sum egna seg til fólk, sum eru eitt sindur meira sjálvhjálpin, og sum ikki hava heilt sama røktartørv, sum tey, ið búgva á røktarheimi.

*Eldri fólk á stovni í Føroyum og Danmark 2020*




Verður samanborið við Bornholm sæst sama myndin. Á Bornholm eru umleið 12% fleiri fólk 80+ enn í Føroyum. Men hóast tað, so vóru einans 424 eldri fólk á bústovni á Bornholm samanborið við 620 í Føroyum.

### Røktarheimspláss – stovnsstøddir
Í Føroyum eru eldraøkini skipað við lutfalsliga nógvum og smáum búeindum. Tað eru 30 røktarstovnar (røktarheim og sambýli) tilsamans. Størsta røktarheimið hevur 70 búpláss, meðan tað eru sambýli, sum hava niður í 7 búfólk. 16 av teimum 30 stovnunum hava færri enn 16 búpláss.

Kommunernes Landsforening í Danmark viðmælir eina røktarheimsstødd upp á 30 ella 60 fyri at fáa ein skilagóðan starvsfólkarakstur í sambandi við at leggja vaktir osfr.

### Dagstovnaøkið og heilsuøkið
Bygnaðurin og stovnsstøddir á dagstovnaøkinum eru rættiliga lík okkara grannalondum. Sjúkrahúsverkið hevur fyri stuttum gjørt stórar bygnaðarbroytingar, sum geva møguleika fyri at optimera samlaða virksemið. Sjúkrahúsverkið er enn í einari tilgongd við bygnaðarligu umskipanini.

## ELDRARØKTIN ER VÆL DÝRARI Í FØROYUM ENN Í DANMARK

### Normeringar og rakstur – eldraøkið
Í Føroyum er starvsfólkanormeringin lutfalsliga høg samanborið við okkara grannalond. Her eru í miðal 0,56 starvsfólk pr. borgara 80 ár og eldri. Í Danmark var samsvarandi talið 0,32 starvsfólk. Hóast skeivleikar kunnu vera í uppgerðini, er tað ein sannroynd, at í føroyska eldraøkinum starvast nærum tvær ferðir so nógv starvsfólk sum í danska eldraøkinum lutfalsliga.

| | Føroyar | Danmark |
|---|---|---|
| Tal av 80+ pr. røktarársverk á eldraøkinum | 2,4 | 3,5 |

Hetta kann vera tí normeringin í Føroyum sum heild er hægri samanborið við okkara grannalond, og at vit harvið hava eitt hægri tænastustøði. Men sannlíkt er samlaða orsøkin meira samansett. Vit hava ein bygnað við lutfalsliga nógvum og smáum røktarbúeindum, samstundis sum vit hava nærum ongar vanligar eldraíbúðir og mest sum onga vælferðartøkni.

Verður hugt at samlaða rakstrarkostnaðinum, so kostaði eldrarøktin í Danmark umleið 47 mia. kr. í 2020. Kostnaðurin í Føroyum og Bornholm var ávikavist 531 mió. kr. og 390 mió. kr. Verður kostnaðurin settur í mun til talið av fólkum omanfyri 80 ár, so sæst, at eldrarøktin er væl dýrari í Føroyum. Her kostar eldrarøktin ein triðing meira enn í Danmark og næstan 60% meira enn á Bornholm.

| 2020 | Danmark | Føroyar | Bornholm |
|---|---|---|---|
| Eldrarøkt, rakstur | 46.900.000 | 531.000 | 390.000 |
| Tal av fólkum, 80+ | 282.000 | 2.372 | 2.770 |
| Rakstur pr. fólk | 166.000 | 224.000 | 141.000 |

**Bústovnar í Føroyum**
Samanborið við londini rundanum okkum eru bústovnarnir á vælferðarøkinum í Føroyum nógvir og smáir. Hetta økir starvsfólkanýtsluna og ger tað truplari at hava skynsaman rakstur á stovnunum.

Eldraøkið

Almannaverkið



# FLEIRI STARVSFÓLK

Sum tað framgongur í hesari frágreiðingini, eru nógvir vegir at tálma starvsfólkatrotinum á vælferðarøkinum. Men sama, hvussu nógvar tillagingar verða gjørdar í mun til uppgávuloysn, bygnaðarbroytingar, vælferðartøkni osfr., ger demografiin í sær sjálvum, at neyðugt er at økja um sjálvt starvsfólkatalið.

Í einari tíð við metlágum arbeiðsloysi og stórum árgangum, sum fara av arbeiðsmarknaðinum, meðan smærri árgangir koma inn ístaðin, er hesin setningur trupul. Tó eru nakrir møguleikar, ið mugu troytast. Í hesum partinum sæst ein yvirskipað gjøgnumgongd av møguleikunum fyri at økja um starvsfólkatalið.

## ÚTBÚGVING OG MENNING AV FØRLEIKUM

### Nýggj deild á Heilsuskúla Føroya

Í Føroyum er møguleiki at útbúgva seg til heilsuhjálpara og heilsurøktara á Heilsuskúla Føroya, sum er í Suðri. Um undirvísing eisini var í meginøkinum, hevði helst verið størri áhugi at søkt inn á skúlan.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at stovna eina nýggja deild á Heilsuskúlanum norðanfyri – helst í tilknýti til eitt annað útbúgvingarstað. Deildin skal fakliga vera ein partur av Heilsuskúla Føroya. Hetta ger útbúgvingina atkomiligari fyri tilkomin, sum hava hús og yngri børn, tí tey ikki nýtast at flyta, fyri at fara undir útbúgving. Harafturat hevði tað verið lættari at eggjað ungum lesandi at fara á Heilsuskúla, tí at ung hava lyndi til at savnast, har onnur ung eru. Á henda hátt hevði tilgongdin til heilsuútbúgvingarnar – og við henni starvsfólkatalið – verið økt.

### Økja áhugan

Afturat hesum tiltøkunum eigur eisini at verða arbeitt við at økja áhugan fyri heilsuútbúgvingunum millum ung og millum bólkar, sum ikki vanliga taka hesar útbúgvingar, t.d. menn. Fyri at hetta skal eydnast, skal ein hugburðsbroyting til.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at eitt miðvíst vegleiðingar- og kunningararbeiði verður sett í gongd longu í fólkaskúlanum. Harafturat skal arbeiðið umfata lýsingarátøk, broyting av upptøkukrøvum, mentorskipanir, røktarbreyt í 10. flokki osfr.

### Fleiri námsfrøðingar

Tørvur er á alsamt fleiri starvsfólkum til dagstovna- og serøkið, og eisini her er ein partur av loysnini at útbúgva fleiri.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at upptøkan av námsfrøðilesandi skal økjast, og upptøka eigur at verða tvær ferðir um árið. Í sama viðfangi eigur útbúgvingin at broytast, soleiðis at møguleiki verður fyri at vejla sergreinir innan dagstovnanámsfrøði og sosialnámsfrøði. Økta upptøkan fer at geva fleiri útbúnar hendur í arbeiðinum.

### Fjarundirvísing

Ein annar máti at gera tað meira atkomiligt at taka útbúgvingar innan heilsu- og námsfrøðiøkini er at leggja útbúgvingarnar til rættis eftir nýggjum leisti, har talgildu miðlarnir og møguleikarnir verða nýttir í størri mun.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at stórir partar av útbúgvingunum skulu kunna takast sum fjarlestur. Tað eigur at vera farið undir eina skipaða tilgongd, har møguleikin fyri fjarundirvísing verður brúktur í nógv størri mun, soleiðis at útbúgvingarnar verða meira fleksiblar og atkomiligar hjá einum størri málbólki av møguligum lesandi, t.d. hjá fólkum, sum eru í starvi ella ikki búgva nærhendis einum útbúgvingarstaði.

### Førleikameting og vaksnamannaútbúgvingar

Nógv ófaklærd fólk starvast í dag innan vælferðarøkini. Ofta hava tey gjørt tað í áravís og hava drúgvar royndir. Tað eigur at vera lættari hjá hesum fólkum at fáa útbúgving innan økið. Á tann hátt kann talið av útbúnum økjast, og samstundis kann hesin møguleikin vera við til at varðveita tey sum starvsfólk á økinum.

### Ískoytispakkar til víðariútbúgving

Útbúgvingarnar á Heilsuskúlanum geva ikki møguleika fyri at fara undir hægri lestur í Føroyum, og hetta kann vera orsøk til, at tær verða valdar frá, tí at tær kunnu sýnast sum ein útbúgvingarligur 'blindur vegur' fyri summi. Fyri at gera tað meira áhugavert at vejla eina útbúgving á Heilsuskúlanum, eigur hetta at tillagast.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at umskipa útbúgvingarnar nakað, soleiðis at møguleiki verður at velja ein ískoytispakka við gymnasialum lærugreinum, sum saman við yrkislærugreinunum gevur atgongd til hægri lestur.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at orða eina fasta mannagongd til førleikameting, sum skal vera grundarlag undir, at eitt vaksnamannatilboð verður skipað. Fólk omanfyri 25 ár við drúgvum royndum eiga at verða frítikin fyri starvsvenjing og eiga at fáa møguleika fyri at taka ástøðiliga partin, meðan tey eru í starvi og fáa løn. Á henda hátt kunnu vaksin taka eina útbúgving upp á stutta tíð uttan at fara úr starvi.

Fremmandmælt eiga at hava sama møguleika fyri at verða førleikamett og taka vaksnamannaútbúgving. Her skulu t.d. inklusjónsprogramm v.m. eisini umhugsast.

Eisini skuldi verið kannað, um tað hevði gjørt heilsu-útbúgvingarnar meiri áhugaverdar fyri ein breiðari bólk, um tær vóru skipaðar sum lærlingaútbúgvingar.

## STUÐULSSKIPANIR

Tað eigur at verða kannað, um almennar stuðulsskipanir skulu broytast, soleiðis at tøk samanberilig arbeiðsmegi kann gera gagn á vælferðarøkinum, har stórur tørvur er á millum annað ófaklærdari arbeiðsmegi. Dømi um tøka arbeiðsmegi er t.d. á fiskavirkjum, har stuðulsskipan til starvsfólkini ger, at hon fær samanberiliga løn við aðrar geirar, m.a. á vælferðarøkið. Stuðulsskipanin er við til at fasthalda starvsfólk í stuðlaðari vinnu, hóast tørvur er á arbeiðsmegi í øðrum geirum, t.d. á vælferðarøkinum.

Upplýsast kann, at hóast arbeiðsloysið bert er 0,9%, svarandi til um 250 fulltíðararbeiðsleys, so eru harumframt í miðal omanfyri 300 arbeiðstakarar, sum fáa útgjald úr fiskavirkisskipanini. Av teimum 1.100, sum eru tilmeldað fiskavirkisskipanina, er stórur partur ófaklærd arbeiðsmegi.

Fiskavirkisskipanin kostar um 25 mió. kr. um árið, og við neyðugum umleggingum hevði hesin peningur komið væl við sum haldførisfígging av vaksandi tørvinum á arbeiðsmegi á vælferðarøkinum.



**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at hugt verður eftir, um fiskavirkisskipanin í sínum núverandi bygnaði ger tað møguligt hjá starvsfólkum ikki at arbeiða ein stóran part av árinum, meðan ovurstórur tørvur er á starvsfólkum á vælferðarøkinum. Verður fiskavirkisskipanin avtikin ella herðingar gjørdar, kann eitt nú hugsast, at á alivirkjum, har tøkan kann ætlast, og á uppisjóvarvirkjum, tá vertíðin er av, at arbeiðsmegin í styttri afturvendandi tíðarskeið kann nýtast á vælferðarøkinum til at avgreiða feriu og avspákingar hjá starvsfólkunum har. Eisini kann hugsast, at einstøk stuðlað flaka- og saltfiskavirki ikki hóra undan, og at starvsfólkini harvið gerast tøk at arbeiða í øðrum geirum, eitt nú á vælferðarøkinum.

**STÓRUR TØRVUR ER Á M.A. ÓFAKLÆRDARI ARBEIÐSMEGI Á VÆLFERÐARØKINUM**

## ARBEIÐA FULLA TÍÐ

Á eldraøkinum er lutfallið millum ársverk og starvsfólk einans 0,6, og fá starvsfólk hava ein setanarbrøk, sum er hægri enn 0,7. Ofta verður víst á tvær orsøkir til lágu miðal arbeiðstíðina. Onnur er, at fólk sleppa ikki upp í tíð, og hin er, at fólk ikki orka at arbeiða meira. Ein nærri kanning av arbeiðstíðini vísir tó, at orsøkin er ein heilt onnur. Í kanningini var skilt ímillum kjarnustarvsfólkini, tey sum hava eldraøkið sum sítt høvuðsstarv alt árið, og so avloysarar, sum bara eru stutta tíð, ella hava eldraøkið sum parttíðarstarv.

Í staðin fyri bara at hyggja eftir sjálvum setanarbrøkinum, var í kanningini eisini hugt eftir, hvussu nógvar tímar fólk í veruleikanum arbeiða. Her sást, at kjarnustarvsfólkini arbeiða rættiliga nógv, serliga um havt verður í huga, at talan í stóran mun er um kvinnur um 60-ára aldur. Helvtin arbeiðir meira enn 0,9 ársverk um árið, og ¼ av teimum arbeiðir meira enn fulla tíð. Hinvegin er eitt sera stórt tal av starvsfólkum, sum arbeiða í styttri tíðarskeið, ella sum arbeiða parttíð. So arbeiðstíðin á eldraøkinum er í veruleikanum als ikki lág. Tað sær bara soleiðis út, tí so nógv eru stutta tíð ella parttíð. Tey, sum hava eldraøkið sum sítt fasta høvuðsstarv, arbeiða lutfalsliga nógv. Hetta hevur við sær, at tað neyvan hjálpir upp á starvsfólkatrotið at royna at fáa tey føstu starvsfólkini upp í tíð, tí tey kunnu neyvan arbeiða stórvegis meira enn tey gera. Loysnin er heldur at fáa fleiri at velja økið sum sítt høvuðsstarv, ella at brúka núverandi starvsfólk meira munadygt.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at ein gjøllig greining av føroyska arbeiðsmarknaðinum verður gjørd. Hetta kann fáa ovurstóran týdning fyri at skipa arbeiðsmarknaðin skynsamari.

Skotið verður upp, at tiltøk verða sett í verk, sum økja starvsfólkakjarnuna. T.d. tiltøk, ið knýta starvsfólkini tættari at arbeiðsplássunum og gera tað freistandi at vera verandi. Tað kann vera arbeiðsumstøður, møguleikar fyri eftirútbúgving, lønarviðurskifti osfr. Harafturat eiga øll at fáa møguleika at fara upp í tíð, um tey vilja tað.

## LØNARVIÐURSKIFTI

Nakrir av fakbólkunum á vælferðarøkinum hoyra til láglønarbólkarnar á arbeiðsmarknaðinum. Staðfestast kann tó, at tað eru samráðingar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum avgera lønir og arbeiðsumstøður annars. Tí er valt ikki at fara nærri inn á hetta økið í hesari frágreiðing.

Tó verður mett, at gott hevði verið at fingið eitt felags faktuelt útgangsstøði fyri orðaskiftinum um arbeiðsviðurskiftini hjá starvsfólkunum á vælferðarøkinum.



**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at ein størri samanberandi arbeiðsmarknaðargreining, sum viðger lønarviðurskifti, mobilitet, aldur, kyn, brøkar o.a. fyri arbeiðsbólkarnar á vælferðarøkinum, verður sett í verk.

Ein avgerandi fortreyt fyri at møta starvsfólkatørvinum eru færri og fakliga sterkari eindir. Hetta sæst serliga innan Almannanverkið, men er galdandi fyri alt vælferðarøkið.

Talan er um eina bygnaðarliga umskipan. Hetta merkir í stuttum, at grundleggjandi broytingar skulu gerast.

Tað ræður um at arbeiða skjótt. Longri tíð, tað tekur at fáa til vega ein nøktandi bygnað innan stovnsøkið, størri eru sannlíkindini fyri, at borgarar, sum hava tørv á bústaði, og sum ikki fáa nøktandi fakliga hjálp, verða verri fyri.

- Bygnaðarlig umskipan skal fremjast
- Nýggir stovnar skulu byggjast ella skipast, sum eru tíðarhóskandi
- Hugsast skal bara í størri eindum
- Fakligari sterkari eindir draga fleiri dugnalig starvsfólk til sín

Almannaverkið:

**60% AV NÚVERANDI BÚEINDUNUM ERU ALS IKKI HÓSKANDI TIL ENDAMÁLIÐ**

## ALMANNAVERKIÐ

Sum víst varð á í partinum um bakstøði, er stovnsbygnaðurin á Almannaverkinum eyðkendur av nógvum, smáum bústovnum, har 37 av 43 stovnum hava færri enn 11 búpláss. Umframt, at teir eru smáir, húsast fleiri av teimum í bygningum, sum ikki eru bygdir og egnaðir til endamálið. Seinasta bygningsmetingin, sum Almannaverkið hevur gjørt saman við Landsverki, vísir, at á leið 60% av bygningunum eru partvís ella fullkomiliga ótíðarhóskandi til endamálið.

Tað er neyðugt at umskipa núverandi stovnar í størri og egnaðar eindir, bygdir til endamálið, og harumframt at kanna møguleikan at savna fleiri ymiskar tænastur, bútilboð, umlætting og virknistilboð á sama matrikli.

**UPPSKOT** ▶ Skotið verður upp at umskipa teir 37 bústovnarnar hjá Almannaverkinum í størri eindir, soleiðis at raksturin verður skynsamari og eindirnar sterkari. Við størri stovnum verður møguleikin fyri at hækka og halda tað fakliga støðið betri. Uml. 450 starvsfólk (265 ársverk) starvast á hesum stovnum í dag, og mett verður, at umleggingin kann minka um starvsfólkatørvin við á leið 50-100 ársverkum ella upp til 35% av netto starvsfólkatørvinum. Umráðandi er at finna fíggjarligu, fakligu og trivnaðarligu bestu loysnina fyri bæði borgara, starvsfólk og avvarðandi. Kannast skal, um skilabest er at skipa stovnar við uml. 16-20 plássum, uml. 30 plássum ella byggja størri stovnar saman við ymsum øðrum tænastum (búpláss, umlætting, virknistilboð o.a).

**Dømi:**
Fyri at vísa á møguleikar at bøta um starvsfólkatrotið við at umskipa stovnar, verður støði tikið í tveimum ítøkiligum dømum:

Almannaverkið hevur 9 einstaklingafyriskipanir til borgarar við stórum tørvi á serkønari hjálp og røkt. Trivnaðurin og harvið støðufestið hjá starvsfólkum rundanum hesar borgarar er ikki gott. Avleiðingin er, at 78 starvsfólk eru knýtt at hesum 9 fyriskipanum, í stóran mun ófaklærd starvsfólk. Vit hava hugt nærri at 4 av hesum einstaklingafyriskipanum, sum hava 32 starvsfólk (16 ársverk). Fyri at veita eina nøktandi tænastu, er tørvur á 8 starvsfólkum pr. borgara.

Í 2023 fær Almannaverkið ein stovn til henda málbólk – Skálagarður. Hesir 4 borgarar kunnu fáa pláss á stovninum, sum hevur 15 bú- og umlættingarpláss. Til teir 15 borgarar, sum fáa pláss á Skálagarði, verður mett, at tørvur er á umleið 32 starvsfólkum (20 ársverk).

Til samanberingar verður talan um 2,1 starvsfólk pr. borgara, ístaðin fyri 8 pr. borgara í einstaklingafyriskipanum. Harumframt verður talan um eina munandi betri tænastu, bæði fakliga og í mun til støðufesti eins og tænastustøði.

Samanumtikið ein betri trivnaður fyri borgaran og starvsfólkið. Starvsfólk verða gagnnýtt til fulnar, svarandi til ein faktor 4. Væntandi verður Skálagarður freistandi og dragandi fyri fakfólk, sum ynskja at verða partur av einum mennandi arbeiðsumhvørvi.

**4 einstaklinga-fyriskipanir í dag**

4 pláss
16,0 ársverk
32 starvsfólk
8,0 starvsfólk pr. pláss

»»

**Skálagarður – primo 2023**

15 pláss
20,0 ársverk
32 starvsfólk
2,1 starvsfólk pr. pláss

Hitt dømið er á sosialpsykiatriska økinum, har Almannaverkið eisini hevur bútilboð í ymsum støddum.

Í Tórshavn hevur Almannaverkið eitt bútilboð til 16 borgarar – Eystan Heyg, sum varð bygt til endamálið í 2014. Stovnurin roynist væl. Starvsfólk trívast og eru støðuføst. Borgarar, sum búgva har, eru sera væl nøgdir við bústaðin. Tey flestu, ið standa á bíðilista til bústað innan sosialpsykiatri, seta fram ynski um at fáa pláss á hesum stovni.

Til samanberingar hevur Almannaverkið 3 smáar stovnar í Vágunum innan sosialpsykiatriska økið. Tilsamans hava hesir 3 stovnar eisini pláss til 16 borgarar.

Eitt hugskot í mun til starvsfólkatrotið er, at Almannaverkið leggur hesar stovnar saman í eina størri eind, tilsvarandi Eystan Heyg. Við slíkari loysn verður tørvurin á starvsfólkum 56% minni, og samlaði rakstrarkostnaðurin verður 7,5 MDKK bíligari um árið.

# SKYNSAMARI ARBEIÐSUMSTØÐUR

Í dag er talan um tríggjar stovnar, men ein nýggjur og størri stovnur við nýmótans útgerð, hevði væntandi havt við sær ein uppaftur betur trivnað. Fysisku karmarnir høvdu verið nógv betri fyri borgarar og starvsfólk. Allir borgarar høvdu fingið sína egnu íbúð við nýmótans útgerð, egnum køki og baðirúmi.

Núverandi stovnar eru eldri sethús, har búfólk hava kømur í ymsum støddum og deila køk og baðirúm.

Myndin niðanfyri samanber Eystan Heyg og teir 3 smáu stovnarnar. Starvsfólkatalið kann minka við meira enn eini helvt, um samanleggingin verður gjørd.

| Sambýli til 16 borgarar | SAMAN-BORIÐ VIÐ: | 3 smáir stovnar |
|---|---|---|
| 16 pláss | | 16 pláss |
| 13,2 ársverk | | 26,7 ársverk |
| 18 starvsfólk | | 41 starvsfólk |
| 1,1 starvsfólk pr. pláss | | 2,6 starvsfólk pr. pláss |
| 6,4 MDKK rakstur | | 13,9 MDKK rakstur |

## ELDRAØKIÐ

Sum víst varð á í partinum um bakstøði, eru, samanborið við nærmastu grannalond okkara, nógv røktarheimspláss í Føroyum. Røktarheimsplássini finnast á lutfalsliga nógvum og smáum búeindum.

Størri búeindir høvdu havt við sær, at starvsfólkaorkan hevði rokkið longri. Mett verður, at búeindir í framtíðini helst skulu hava 24 búpláss og sum minsta mark 16 búpláss fyri at verða rikin rakstrarliga skynsamt.

Verður hugt at stovnunum á eldraøkinum, eru teir 30 í tali. Av teimum 30 stovnunum eru 16 stovnar við færri enn 16 búplássum. Hetta merkir, at bert 14 av stovnunum liva upp til krøvini um eina stovnsstødd, har starvsfólkaorkan arbeiðir skynsamt.

Nógv av gomlu sambýlunum eru smá og krevja tí nógv starvsfólk. Harumframt eru tey ikki tíðarhóskandi. Umstøðurnar á hesum heimum gera tað ómøguligt at nýta hjálpartól sum t.d. loftslyftur. Fysisku karmarnir gera, at tørvur er á fleiri starvsfólkum enn á teimum heimum, sum eru bygd til endamálið.

Eisini kann verða truplari at fáa fólk at arbeiða í fullum brøki, tá ið tey eru knýtt at minni búeindum.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at eitt arbeiði verður sett í gongd, har kannað verður, hvussu nakrir av teimum minstu, mest ótíðarhóskandi og lutfalsliga starvsfólkatyngstu stovnunum kunnu umskipast til størri eindir.

### Geirasamstarv

Fleiri partar loysa somu uppgávur. Hetta er øgiliga óheppið og óskynsamt í mun til starvsfólk. Um so var, at mørkini millum geirar vórðu strikað, kundi hetta verið gjørt betri og við færri starvsfólkum. Sum støðan er nú, verður kappast um somu fólk við somu førleikum, sum tað frammanundan ikki er nóg mikið av.

Víst verður á hesi øki sum umskarast:

- Demens, ellis- og røktarheim
- Gerontopsykiatri
- Stuðul/heimatænasta

Demensøkið er helst sterkasta dømið.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at demensøkið verður savnað hjá kommununum og at hini økini verða greinað nærri, áðrenn tilmæli um annað og týðiligari ábygdarbýti kann gerast.

### Organisering

Kann sjálvsavgerðarrættur hjá starvsfólkum, øðrvísi arbeiðstilrættalegging og øðrvísi organisering gera, at starvsfólkini støðast betri, hava minni sjúkrafráveru og arbeiða meira munadygt og á hægri fakligum støði? Fleiri royndir og kanningar í grannalondunum innan heimarøktina hava víst, at so er. Tað er serliga hálandska Buurtzorg modellið við sjálvstýrandi toymum í heimarøktini, ið hevur víst jalig úrslit. Bæði heilsustarvsfólk og eldri borgarar hava verið serstakliga væl nøgd við henda organisationshátt. Harafturat hava royndirnar víst stóran fíggjarligan vinning. Eldru borgararnir klára seg betri sjálvir og hava færri innleggingar.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at greina Buurtzorg skipanina nærri, og síðani at gera avmarkaðar royndir í einum eldraøki. Um tað virkar væl, kann skipanin verða sett í verk í fleiri økjum.

### Aðrir fakbólkar

Aðrir fakbólkar og nýggj samstørv innan heilsu og vælferð kundu møguliga verið við til at lætt um uppgávuna, har tørvurin á røktarstarvsfólkum, er størstur. Á henda hátt koma førleikarnir til gagns, har tað er mest tørvur á teimum.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp saman við Apoteksverkinum at arbeiða við, hvussu tilboðið um heilivágsgjøgnumgongd kann víðkast. Til dømis um farmakonomar/farmaseutar kunnu gera heilivágsgjøgnumgongd á røktarheimum, bústovnum o.a. Hetta hevði fyribyrgt feilmedisinering og havt ágóða fyri starvsfólkatørvin á tann hátt, at borgarin var betri fyri, og færri innleggingar vórðu.

Skotið verður upp, at tættari samstarv skal verða millum eldrarøktina og akuttoymið og serøkið og akuttoymið hjá sjúkrahúsverkinum. Eitt mobilt akuttoymi, sum í kvøld- og náttarvaktum kundi koyrt út til røktarheimini, tá tørvur er á fakligheit og vitan, hevði fyribyrgt innleggingum og lætt um starvsfólkatørvin.

Skotið verður upp at kanna, hvussu ein skipan við føstum kommunulækna á røktarheimum og bústovnum á serøkinum kann skipast. Orsøkin er, at á summum røktarheimum brúka starvsfólk nógva arbeiðsorku uppá at fáa fatur á fleiri ymsum kommunulæknum dagliga. Henda arbeiðsorkan kundi verið nýtt til annað virksemi í staðin fyri.

Fleiri og øðrvísi bústaðir og vælferðartøkni eru avgerandi grundarlag fyri at minka um tørvin á starvsfólkum.

Bæði eldraøkið og Almannaverkið hava stóran tørv á tíðarhóskandi bústøðum, sum skapa fakligar karmar og skapa grundarlag fyri at nýta vælferðartøkni í størri mun. Bústaðarmøguleikarnir skulu egna seg til málbólkin og gera borgaran so sjálvbjargnan sum gjørligt.

## BÚSTAÐARTØRVUR – ELDRAØKIÐ – ELDRABÚSTAÐIR

Føroyski bústaðarmarknaðurin er eyðkendur av, at fólk búgva í egnum húsum meginpartin av lívinum. Tá fólk eldast, og húsini kanska verða ov stór og óegnað til t.d. rørslutarn, eru ikki nógvir aðrir møguleikar fyri at flyta í hóskandi og minni bústað. Tí er røktarheim einasti møguleiki hjá nøkrum borgarum, hóast borgarin kanska hevði klárað seg við minni hjálp í einum betri egnaðum bústaði. Snøgt sagt manglar ein 'millumbúformur' millum egin hús og røktarheim.

Mælt verður til, at útbyggingin á eldraøkinum komandi árini í nógv størri mun fevnir um eldraíbúðir heldur enn røktarheimspláss. Eldrabústaðir eru íbúðir, ið eru serliga innrættaðir til eldri fólk og fólk við rørslutarni.

**Nógvir fyrimunir eru við eldrabústøðum:**

- Bústaðurin er egnaður til rørslutarnað, og fólk kunnu tí vera nógv longur heima, áðrenn tey fara á røktarheim.
- Tey eldru koma at búgva, har onnur eldri búgva. Hetta økir um trivnaðin, minkar um vandan fyri einsemi og gevur møguleikar fyri felags tiltøkum og felags loysnum.
- Røktin gerst meira effektiv, um fleiri eldri búgva saman, tí minni tíð fer til flutning.
- Eldri fólk sleppa undan at viðlíkahalda og upphita eini stór sethús.
- Størri útboð av bústøðum, so sethús gerast tøk til barnafamiljur.
- Skynsamari nýtsla av bústøðunum, tí fermetrarnir kunnu tillagast tørvinum, so hvørt sum fólk eldast.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at fleiri eldrabústaðir verða fingnir til vega – bæði almennar leiguíbúðir, privatar leiguíbúðir og eigaraíbúðir.

### Samstarv millum kommunur og Bústaðir

Frammanfyri nevnda uppskot fer at krevja nógva bygging næstu árini. Og nógva fígging. Hesa fígging kunnu kommunurnar í stóran mun taka á seg. Við tíðini vil henda íløgan verða lønandi.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at fleiri almennar leigu-íbúðir verða gjørdar sum samstarv millum kommunurnar og felagið Bústaðir. Til dømis kundi talan verið um eina loysn, har kommunurnar eru eigarar og hava ávísingarrætt til íbúðirnar, meðan Bústaðir stendur fyri bygging, viðlíkahaldi og umsiting. Kommunurnar útvega byggilendi og fígging.

Skotið verður upp, at fyri at útvega fleiri eldravinarligar eigara-bústaðir ella privatar leigubústaðir eiga kommunurnar at seta ávíst lendi av til eldrabústaðir. Í byggisamtyktini eigur at verða sett neyv krøv til, hvussu hesar íbúðir skulu innrættast. Fyritøkur kunnu síðan byggja íbúðir annaðhvørt til sølu ella leigu.

## BÚSTAÐARTØRVUR – ALMANNAØKIÐ

Tann samlaði tørvurin á bústøðum til málbólkarnar undir Almannaverkinum tey komandi 10 árini er mettur at tátta í 500 bústaðir, íroknað núverandi 244 bústaðir. Hetta eru bústaðir til m.a. borgarar, sum í dag standa á bíðilistum til sambýlir, búfelagsskapir, bú- og viðgerðartilboð og til borgarar, sum fáa aðrar tænastur frá Almannaverkinum.

Í tíðarskeiðinum fella nakrir borgarar frá, men royndirnar vísa, at nettovøksturin verður svarandi til, at Almannaverkið fer at hava tørv á umleið 500 bústøðum komandi 10 árini, og teir allarflestu longu innan 5 ár.

Niðanfyri er mynd av "bústaðartrappuni", sum vísir núverandi støðu (svørt tøl) og framtíðartørvin (gul tøl) hjá Almannaverkinum. Hægri uppi á trappuni tilboðið er, minni "starvsfólkatungt" er tað, og bíligari er rakstarkostnaðurin pr. dag pr. borgara.




Almannaverkið arbeiðir longu í dag við einari útbyggingarætlan, sum fer at nøkta umleið ein fjórðing av bústaðartørvinum. Stórur dentur verður lagdur á, at øll nýbygging tryggjar fakligar karmar og rakstrargóðar umstøður, soleiðis at nýggju bústaðirnir geva ein skynsamari starvsfólkarakstur.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at ein skipað ætlan verður gjørd fyri samlaða bústaðartørvinum á Almannaøkinum við serligum atliti til, at bústaðirnir stuðla undir lívsvirði og sjálvbjargni hjá borgaranum, fakligheit og skynsaman starvsfólkarakstur.

## VÆLFERÐARTØKNI

Vælferðartøkni er at brúka nýggjar tøkniligar møguleikar, so at fleiri borgarar kunnu fáa nøktandi tænastur. Málið er, at fólk kunnu liva betri, tryggari og longri í egnum heimi. Trýstið á bústovnarnar gerst minni og starvsfólkatørvurin lægri. Eisini á bústovnum kunnu starvsfólk við hjálp frá tøkni veita betri og fleiri tænastur. Trivnaður og arbeiðsumhvørvi kunnu betrast, og frágongdin av starvsfólkum minka.

Fyrsta stigið er at savna kommunur, eldrasamstørv og landsstovnar í eini felags avtalu um, hvussu arbeiðið kann skipast í eini felags organisatión, ið bæði leiðir tilgongdina og ráðgevur pørtunum, eftir at innleiðandi arbeiðið er gjørt. Síðan at leggja strategi og ætlanir fyri, hvussu vælferðartøknin kann verða breidd út komandi árini. Savna partarnar í netverk, har royndar- og menningarátøk verða samskipað, og har kunnað verður um royndir.

Skal implementering av vælferðartøkni gera mun, má hon takast í brúk á skipaðan hátt.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at gera og seta í verk eina framsókna strategi fyri, hvussu vælferðartøkni verður ein týdningarmikil partur, tá ið hjálp, stuðul og røkt verður veitt á eldra- og serøkinum. Munandi íløgur mugu verða gjørdar í vælferðartøkni. Møguliga eigur grunnur at verða stovnaður, sum kann veita stuðul til verkætlanir við vælferðartøkni.

# HEILSUFREMJAN OG RÆTTSTUNDIS ÁTØK

Tørvurin á almennum tænastum er tætt tengdur at fólkaheilsuni. Frískir borgarar hava minni tørv á almennum veitingum. Í Føroyum sum í okkara grannalondum verður almenna veitingin ásett eftir førleikanum hjá tí einstaka borgaranum.

Verður hugt yvirskipað eftir fólkaheilsuni í Føroyum sæst, at Føroyar ikki eru so væl fyri sum onnur lond. T.d. tá talan er um royking, kost, rúsdrekka, rørslu og sálarheilsu. Hetta eru tættir, sum hava stóra ávirkan á, hvussu væl fyri borgarin er, og hvussu stór sannlíkindi eru fyri tørvi á veitingum, sjúku og deyða. Samanumtikið vísa kanningar, at tá tað kemur til heilsuvanar, so er rúm fyri batum á fleiri økjum, serliga tá tað kemur til royking, vekt, rørslu og sálarheilsu.

Tí eiga fyribyrgjandi átøk at setast í verk, sum skulu vera við til at loysa trupulleikan við starvsfólkatørvi. Fyribyrgjandi tiltøk skulu síggjast sum ein samfelagslig íløga fyri at menna heilsu og førleikar hjá borgarunum.

Ein annar táttur, ið kann gera fólk betri fyri og harvið útseta ella minka um tørvin á almennum veitingum, er rehabilitering. Rehabilitering er ein hugsunarháttur – ein samstarvsprosess – har borgarin, saman við fakfólki og avvarðandi, arbeiðir miðvíst móti málum, sum borgarin ynskir at menna. Ein væleydnað rehabilitering ger, at borgarin heilt ella partvíst kann megna gerandisdagin og fær betraða lívsgóðsku.

Á komandi síðunum síggjast nøkur hugskot til, hvussu arbeiðast kann miðvíst við fyribyrging og rehabilitering fyri at menna heilsu og førleikar hjá borgarunum.

## HEILSUFREMJAN

### KROPSLIG HEILSA

Tað eigur at verða sett inn á øllum økjum, bæði miðvíst og stigvíst, at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum. Hetta er ein uppgáva fyri øll t.v.s. land, kommunur, fyritøkur, felagsskapir, borgarar o.s.fr. Tiltøkini hava til endamáls at betra um kostvanar og kropsligt virkni umframt at minka um royking og rúsdrekkanýtslu hjá øllum føroyingum í øllum aldri. Heilsufremjandi tiltøk eiga at mennast, so tey verða málrætta ymsu málbólkunum.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at fleiri miðvís tiltøk verða sett í verk fyri at menna kropsligu heilsuna. T.d. tiltøk, sum betra um møguleikarnar fyri meiri rørslu, tiltøk, sum minka um nýtsluna av ósunnum mati og drykkjum og gera tað lættari og bíligari at velja sunt. Tiltøk sum minka um royking og rúsdrekkanýtslu eiga at vera sett í verk.

## SÁLARLIG HEILSA

Sálarlig strongd er serstakliga høg millum ungar føroyingar, hetta sæst bæði í kanningum og í nýtsluni av antidepressivum heilivági og psykofarmaka, sum er vaksin ógvusliga nógv í Føroyum seinastu árini. Tølini fyri einsemi eru eisini høg og hægst millum tey ungu. Ein munadyggur fyribyrgjandi innsastsur má gerast, og hetta krevur m.a. samskipan av øðrum fyribyrgjandi átøkum og samstarv millum fleiri geirar og stovnar.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at ABC (A: Ver virkin, B: Ver saman, C: Ver hugbundin) verkætlanin fyri sálarliga heilsu, sum longu er í gongd, og sum riggar væl, verður styrkt og framtíðartryggjað.

A VER VIRKIN

B VER SAMAN

C VER HUGBUNDIN

## FYRIBYRGING – BETRI DAGSTOVNAR

Góðir, vælnormeraðir dagstovnar við starvsfólkum við góðum førleikum hava betri møguleikar fyri at geva umsorgan og tryggleika og at birta uppundir menningarmøguleikarnar hjá børnum. Kanningar vísa, at børn frá slíkum stovnum klára seg betri seinni og hava minni tørv á stuðli. Grundarlagið undir einum heilsugóðum lívi verður lagt í barnaárunum, og tí eigur dentur at verða lagdur á heilsufremjan í dagstovnunum.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at stovnarnir arbeiða miðvíst við at seta orð á námsfrøðiligu kjarnuuppgávuna, m.a. við einari yvirskipaðari námsætlan. Harafturat skal tryggjast, at starvsfólkið hevur teir røttu førleikarnar við skipaðari førleikamenning og útbúgving.

Skotið verður upp, at kommunurnar tryggja, at allir dagstovnar hava atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving í nærumhvørvinum.

Skotið verður upp, at kost- og rørsluætlan fyri børn á dagstovnum verður gjørd.

Umframt at ávirka starvsfólkatørvin óbeinleiðis við at børnini fáa minni tørv seinni í lívinum, ávirka hesi uppskot eisini starvsfólkatørvin beinleiðis, av tí at starvsfólkini fara at støðast og trívast betri, og tað verður lættari at draga nýggj starvsfólk til.

## FYRIBYRGING – BÚ/VIÐGERÐARSTOVNAR TIL SÁLARSJÚK UNG

Í Føroyum er tørvur á fyribyrgjandi og mennandi samdøgursviðgerð til børn og ung við ymsum avbjóðingum.

Við einum miðvísum, vælmannaðum og serkønum bú- og viðgerðartilboði kunnu fleiri av hesum ungu koma (aftur) á føtur og fáa eitt (meira) sjálvbjargið lív innan lutfalsliga stutta tíð 3-7 ár.

Innsatsurin hevur til endamáls at flyta tey ungu upp eftir 'bústaðartrappuni', soleiðis at tey fáa eitt so sjálvstøðugt lív, sum til ber, og hervið minkar starvsfólkanýtslan.

**Bústaðartrappan**




*Bústaðartrappan vísir samdøgurskostnaðin av og starvsfólka-nýtsluna í teimum ymsu bútilboðunum. Endamálið er at flyta tey ungu so høgt uppá trappuna sum gjørligt.*

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at víðka málbólkin til bú- og viðgerðar-stovnar, soleiðis at ung við autismu, lættari menningartarni og sálarsjúku kunnu fáa bú- og viðgerðartilboð. Harafturat skal talið av plássum økjast til minst tað dupulta, tvs. frá 21 í 2021 til 43 komandi árini.

Royndir frá einum slíkum tilboði vísa, at av 14 ungum eru 7 í ella ávegis til egna íbúð, 3 eru flutt í annað tilboð og 4 hava avbrotið viðgerðina í úrtíð. Fyri 7 av teimum ungu, sum upprunaliga høvdu tørv á starvsfólkum 24/7 er starvsfólkanýtslan minkað heilt niður í 0-10%. Tey fyrstu 5 ungu høvdu áðrenn tilboðið 803 innleggingardøgn um árið á psykiatriska deplinum, aftaná eitt ár høvdu tey 26 innleggingardøgn og aftaná tvey ár bert 10 innleggingardøgn.

Hóast tilboðið er lutfalsliga umfatandi og dýrt, er tað at síggja sum ein samfelagslig langtíðaríløga, sum verður til eina sparing fyri samfelagið innanfyri eitt áramál upp á 3-7 ár, tí tørvurin á starvsfólkum til tey ungu minkar munandi. Í staðin verða tey ungu virkin á arbeiðsmarknaðinum.

## FYRIBYRGING – HEIMAVITJANIR

Árligar fyribyrgjandi heimavitjanir er eitt lóggivið tilboð til øll eldri omanfyri 75. Endamálið er at tosa við eldri borgaran um evni, sum tey eldru sjálvi ynskja at tosa um og um heilsustøðuna sum heild. Á henda hátt kann førleikamissur forðast og tiltøk kunnu setast rættstundis í verk fyri at halda tann eldra borgaran frískan og minka um tørvin á vælferðartænastum og starvsfólkum. Tilboðið er gott, og ynskiligt hevði verið, at fleiri borgarar fingu møguleika fyri at fáa heimavitjan.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at málbólkurin fyri heimavitjan verður víðkaður, soleiðis at fólk sum eru sárbar, kunnu fáa vitjan eftir tørvi, frá tey eru 70 ár. Sárbar kunnu t.d. vera einsamøll, hava serligar avbjóðingar, hava mist hjúnafelaga el.líkn.





## REHABILITERING – SYSTEMATISK, ÚTGREINANDI OG TVØRGANGANDI REHABILITERING

Stórt arbeiðið hevur seinastu árini verið lagt í at menna rehabiliteringsøkið í Føroyum. Rætturin til endurvenjing og endurvenjingarætlan er staðfestur í lóggávu, og nógvur peningur er seinastu árini settur av á fíggjarlógini til at uppraðfesta og menna rehabilitering bæði í sjúkrahúsverki og almannaverki. Tó er langt eftir á mál. Fyri at rehabiliteringin skal geva tey ynsktu úrslitini fyri borgara og samfelag, er avgerandi at samskipa rehabiliteringina betur ímillum geirarnar, so at borgarin fær eitt samanhangandi rehabiliteringstilboð.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp, at arbeitt framhaldandi verður við at verkseta rehabilitering sum hugsunarhátt í Føroyum. Avgerandi er at fáa samskipað rehabiliteringina betur tvørturum Sjúkrahúsverk, Almannaverk og kommunala geiran, so at borgarar ikki detta niðurímillum ymsu geirarnar, men fáa eitt samanhangandi rehabiliteringstilboð.

Ein beinleiðis framskriving av starvsfólkatørvi út frá verandi gongd vísir, at tørvur verður á sera nógvum starvsfólkum á vælferðarøkinum komandi árini. Her er talan um almennt sett starvsfólk.

Neyðugt er at hugsa í alternativum loysnum fyri at nøkta tørvin. Sum sæst aðrastaðni í frágreiðingini eiga tiltøk at verða sett í verk, sum minka um starvsfólkatørvin, t.d. tiltøk, sum gera raksturin meira skilagóðan og tiltøk, sum betra um førleikarnar hjá borgaranum. Eisini eigur at verða kannað, hvussu aðrir aktørar kunnu fáa ein leiklut á vælferðarøkinum. Til dømis við at loysa uppgávur, sum antin lætta um uppgávuna hjá starvsfólkunum á vælferðarøkinum ella betra um førleikarnar hjá borgarunum. Innan fyribyrgingarøkið er eisini møguligt at byggja upp álitisfull samstørv millum tann almenna geiran og aðrar aktørar, t.d. sivilgeiran.

## SJÁLVBOÐIN ARBEIÐSMEGI

Møguleikar fyri at tvinna tann almenna geiran saman við tí sivila geiranum á ymiskan hátt, sum lættir um trýstið á vælferðarskipanum, samstundis sum samanhangsmegi samfelagsins verður styrkt, eiga at verða kannaðir.

Longu í dag eru nógv, sum gera sjálvboðið arbeiði í Føroyum til gleði fyri bæði seg sjálvan og fyri borgararnar. Men enn fleiri kundu gjørt sjálvboðið arbeiði, um tað gjørdist meira attraktivt, betri skipað og vendi sær móti fleiri málbólkum. T.d. kundu stuðulsskipanir verið settar í verk, sum gera tað lættari og ómakaleysari at vera sjálvboðin osfr.

Rákið í vælferðarsamfeløgum kring okkum í dag er, at ein alsamt størri partur av vælferðartænastum verður framleiddur av sjálvsognarstovnum, av sjálvbodnum felagsskapum og øðrum sjálvbodnum bólkum – í samstarvi við tann almenna sektorin – men eisini í alsamt størri mun sum vøra.



Ein tílík gongd setur stór krøv til, hvussu loysnirnar verða skipaðar. Og tað er avgerandi, hvussu tann almenni geirin og tann sjálvbodni geirin samstarva. Samlaða føroyska strategiin at tálma vøkstrinum í eftirspurninginum av starvsmegi – serliga innan umsorganarøkini, má vera javnvigað soleiðis at samanhangsmegin í vælferðarsamfelagsskipanunum verður varðveitt. T.d. er av stórum týdningi at varðveita tað besta úr samhaldsføstu statsligu vælferðarskipanini saman við tí besta úr sivilsamfelagsorganisatiónunum.

Tað er umráðandi at finna hóskandi organisatiónsformar, góðar samstarvsformar og góðar insitamentsstrukturar millum sjálvbodna arbeiðið og tað almenna/statin.

**UPPSKOT ▶** Skotið verður upp at seta í verk verkætlan, ið kann lýsa, greina og granska møguleikarnar fyri, at sjálvboðið arbeiði í Føroyum kann supplera vælferðarskipanirnar, so at tær mennast og styrkja samanhangsmegina. Og at sjálvboðið arbeiði verður raðfest og viðurkent.

## AVVARÐANDI

Avvarðandi eru og hava altíð verið ein avgerandi táttur, tá borgarin manglar ella missir førleikar. Familjurnar í Føroyum hava ein stóran leiklut í vælferðini hjá tí einstaka. Eftirhondini sum vælferðin er vorðin til eina almenna ábyrgd og proffessionaliserað, síggjast tekin um, at familjurnar sleppa tí leiklutinum og tí uppgávuni, tey áður hava átikið sær. Hetta sæst týðiliga í grannalondum okkara og kanska eisini í Føroyum.

Fyri at tálma starvsfólkatørvinum er neyðugt, at ongar góðar hendur rundanum tann veika borgaran sleppa. Tí eiga tiltøk at verða sett í verk, sum tryggja, at tey avvarðandi fáa góðan møguleika at vera uppií umsorganini fyri borgaranum, og at tey verða hoyrd og tikin upp á ráð, tá avgerðir verða tiknar. Tey hava ein týdningarmiklan leiklut og eiga at verða virðismett fyri teirra hjálp og vitan um borgaran, sum tey kenna best.

**UPPSKOT** ▶ Skotið verður upp, at eitt arbeiði verður sett í gongd við at orða eina avvarðandistrategi ella avvarðandipolitikk, har karmar og mál verða sett fyri, hvussu samstarv, samavgerðarrættur, stuðul og virðing millum tað almenna og tey avvarðandi skal virka.

## AVMYNSTRING

Tann mest avgerandi orsøkin til komandi starvsfólkatørv á vælferðarøkinum er, at talið av borgarum omanfyri 80 veksur so nógv – 52% komandi 10 árini. Samstundis sæst, at fleiri hundrað starvsfólk á vælferðarøkinum náa pensjónsaldur í sama tíðarskeiði.

Kundi henda avbjóðingin verið vend til ein nýggjan møguleika? Ein møguleika har endamálið er at skapa áhuga at varðveita tilknýtið hjá hesum pensjonistum til annaðhvørt tann etableraða arbeiðsmarknaðin ella tann sjálvbodna arbeiðsmarknaðin.

Um ein partur av teimum, sum fara av arbeiðsmarknaðinum, finnur meiningsfullar uppgávur í tí sjálvbodna geiranum, kundi nakað av trýstinum á vælferðartænastunum møguliga linka.

**UPPSKOT** ▶ Skotið verður upp at gera eina miðvísa avmynstringar-strategi, sum er virðilig fyri tann, sum fer av arbeiðsmarknaðinum. Bæði tað almenna og tað privata eiga at menna skipanir, sum hava til endamáls at varðveita týdningarmikla vitan og førleika í organisatiónini, og at stuðla undir, at starvsfelagar, sum fara av arbeiðsmarknaðinum fáa møguleika at brúka vitan, førleikar og royndir í øðrum høpi og ikki minst tí sjálvbodna geiranum.

## PRIVATIR AKTØRAR

Í øðrum londum verður ein vaksandi partur av almennu umsorganaruppgávuni loystur av privatum aktørum. Í sjálvum sær hevur hetta ikki ávirkan á starvsfólkatørvin, tí at hesir aktørar skulu nýta somu mongd av starvsfólkum til at loysa uppgávuna. Hetta verður tí ikki viðgjørt nærri í frágreiðingini.

# YVIRLIT YVIR LOYSNIR

## LOYSNIR

Her sæst eitt yvirlit yvir uppskot til loysnir á starvsfólkatørvinum á vælferðaøkinum, sum arbeiðsbólkarnir eru komnir fram til


| LOYSN | HØVUÐSÁBYRGD | SÍÐA |
|---|---|---|
| Nýggj deild av Heilsuskúla Føroya | UMMR | 12 |
| Økja áhugan millum ung | UMMR | 12 |
| Fleiri námsfrøðingar | UMMR | 12 |
| Fjarundirvísing | UMMR | 13 |
| Førleikameting og vaksnamannaútbúgvingar | UMMR | 13 |
| Ískoytispakkar til víðariútbúgving | UMMR | 13 |
| Stuðulsskipanir | FMR | 14 |
| Arbeiða fulla tíð | KF, FMR | 15 |
| Lønarviðurskifti | FMR | 15 |
| Umskipan av stovnum almannaverkið | AMR | 16 |
| Umskipan av stovnum eldraøkið | KF | 18 |
| Geirasamstarv | AMR, KF | 19 |
| Organisering | KF | 19 |
| Farmakonomar/-seutar á stovnum | HMR | 19 |
| Akuttoymið | HMR | 19 |
| Fastir kommunulæknar á stovnum | HMR | 19 |
| Fleiri eldrabústaðir | KF, AMR | 20 |
| Fleiri bústaðir Almannaverkið | AMR | 21 |
| Vælferðartøkni | KF, AMR | 21 |
| Heilsutiltøk | HMR | 22 |
| Betri dagstovnar | KF | 23 |
| Bú- og viðgerðarstovnar | AMR | 24 |
| Heimavitjanir | KF, AMR | 25 |
| Rehabilitering | HMR | 25 |
| Sjálvboðin arbeiðsmegi | KF, AMR | 26 |
| Avvarðandistrategi | KF, AMR | 27 |
| Avmynstringarstrategi | AMR, FMR | 27 |

## NIÐURSTØÐA

Henda frágreiðingin við heitinum “Í góðum hondum” er ætlað sum samskipað boð uppá, hvussu stóri starvsfólkatørvurin innan ymsu vælferðarøkini komandi 10 árini kann tálmast.

Ein stór avbjóðing er, at talið á eldri borgarum tvífaldast og starvsfólkaorka er ikki til at veita somu tænastur, sum verða veittar í dag.  Innan bæði ser- og dagstovnaøkið er stórur tørvur á útbúnum starvsfólki.

Ein loysn er at útbúgva fleiri starvsfólk, men tað loysir ikki avbjóðingina aleina. Neyðugt er eisini við øðrum átøkum, sum minka um tørvin á starvsfólki. Fleiri av uppskotunum leggja upp til at byggja hóskandi stovnar og bústaðir, har tørvurin á starvsfólki er lægri. Men tað eru eisini fleiri onnur átøk, sum hava til endamáls, at fólk í størri mun klára seg sjálvi ella við avmarkaðari hjálp.

Frágreiðingin er ætlað sum uppleggtil framhaldandi alment og politiskt orðaskifti. Hoyringar hava ikki verið enn, men mælt verður til, at hetta verður tað næsta. Síðan eigur ein politisk viðgerð at verða av samlaða tilfarinum.

Neyðugt er at fara undir eina tilgongd sum skjótast, har ætlanir verða lagdar fyri, hvussu vit eisini í framtíðini kunnu siga, at vit eru í góðum hondum í føroyska vælferðarsamfelagnum.

**HENDA FRÁGREIÐINGIN ER ÆTLAÐ SUM UPPLEGG TIL VÍÐARI ALMENT OG POLITISKT ORÐASKIFTI**

# LUTTAKARALISTI

Her er eitt yvirlit yvir stýrisbólk, samskiparar og arbeiðsbólkar, sum hava verið við í arbeiðnum at skriva hesa frágreiðingina.

| Stýrisbólkur | Stovnur |
|---|---|
| Poul Geert Hansen | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| Helena Dam á Neystabø | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| Turid Arge | Heilsumálaráðið |
| Eyðun Mohr Hansen | Almannamálaráðið |
| Edvard Heen | Almannaverkið |
| Eyðun Christiansen | Kommunufelagið |
| Steinar Eirikstoft | Sjúkrahúsverkið |
| Bjarni Askham Bjarnason | Fíggjarmálaráðið |

**Samskiparar**

Heri á Rógvi

Guðny Vang

| Arbeiðsbólkur: Útbúgving og førleikamenning | Stovnur |
|---|---|
| Hanna Ziskason Hansen | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| Terji Beder | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| John K. Dalsgarð | Yrkisdepilin |
| Anita Fuglø | Kommunala Arb.gevarafelagið |
| Jan Mortensen | Fíggjarmálaráðið |
| Jákup Foldbo | Kommunufelagið (Runav. Komm.) |
| Selma Herup | Sjúkrahúsverkið |
| Asta Marjunardóttir | Almannaverkið |
| Bina Reginsdóttir | Kommunala Arbeiðsgevarafelagið |

| Arbeiðsbólkur: Umskipan og útveiting av uppgávum | Stovnur |
|---|---|
| Hans Kári Vang | Kommunufelagið |
| Helena Dam á Neystabø | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| Randi Frederiksberg | Yrkisdepilin |
| Bjarni Mortensen | Fíggjarmálaráðið |
| Poul Geert Hansen | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |

| Arbeiðsbólkur: Fyribyrging og rættstundis innsatsur | Stovnur |
|---|---|
| Høgni V. Warberg | Uttanríkis- og Mentamálaráðið |
| Hjørdis S. Mortensen | Almannaverkið |
| Irena Nolsø | Heilsumálaráðið |
| Turid Arge | Heilsumálaráðið |
| Marjun Poulsen | Kommunufelagið (Tórsh. Komm.) |
| Birna Steingrímsdóttir | Almannamálaráðið |
| Beinta Dalbø | Kommunufelagið (Tórsh. Komm.) |
| Magni Mohr | Heilsumálaráðið (Fólkaheilsuráðið) |

| Arbeiðsbólkur: Strukturell umskipan | Stovnur |
|---|---|
| Eyðun Christiansen | Kommunufelagið |
| Eyðun Mohr Hansen | Almannamálaráðið |
| Edvard Heen | Almannaverkið |
| Atli Suni Leo | Fíggjarmálaráðið |
| Steinar Eirikstoft | Sjúkrahúsverkið |
| Eyðfríð Jacobsen | Kommunufelagið (Tórsh. Komm.) |



# Í GÓÐUM HONDUM

**ALMANNAMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Sicial Affairs

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

**UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Foreign Affairs and Culture

**HEILSUMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Health

almannaverkið

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Kommunufelagið

Svanamerktur prentlutur 541 705
Prent: Føroyaprent

sniða.fo